§

Ítróttadómstólurin

**Úrskurður Ítróttadómstólsins viðvíkjandi kæru frá VÍF Kappróðri um umróður hjá 5-mannaførum kvinnum á Ólavssøku 2013.**

**Úrskurður Ítróttadómstólsins**

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru, dagfest tann 29. august 2013 frá VÍF Kappróðri um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfestur 19. august 2013, um umróðurin hjá Havfrúnni og Ørnini á Ólavsøku.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava fimm nevndarlimir luttikið: Anna Dam, forkvinna, Anja Hovgaard, næstforkvinna, Poul Hansen, Jóhan Lamhauge og Børge B. Hansen.

Semja er millum limir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

**Málslýsing**

Av skjalatilfarinum í málinum framgongur, at undir kappróðrinum hjá 5-mannaførum við kvinnum á Ólavsøku 2013, var ikki gjørligt at staðfesta, hvør av bátunum Havfrúgvin og Ørnin, ið var fyrr um málstrikuna. Neyðugt var tí við umróðri.

Undir umróðrinum metti startdómarin, at Havfrúgvin hevði tjóvstartað og gav startdómarin tí Havfrúnni reytt kort. Sambært úrslitayvirlitinum hjá Róðrarsambandinum frá Ólavsøkuni 2013 fekk Havfrúgvin onga plasering og onki stig fyri róðrarnar á Ólavsøku 2013.

VÍF kappróður ger galdandi, at Havfrúgvin í minsta lagi hevur rætt til eitt annað pláss fyri róðurin á Ólavsøku. Hetta tí tær longu høvdu róð einaferð, har tær komu javnar á mál við Ørnina, og dømingin fyri umróðurin kann ikki ávirkað fyrra róðurin.

Somuleiðis vil kærarin vera við, at Havfrúgvin ikki tjóvstartaði og tí er vorðin órættvíst viðfarin, tá tær fingu reytt kort. Víst verður á, at allar umborð á Havfrúnni halda uppá, at tær ikki tjóvstartaðu og út frá sjónbandaupptøkum er hetta heldur ikki at síggja.

VÍF kappróður vísur eisini á, at dømingin við reyða korti er ikki heimilað í lógunum hjá RSF, har onki verður nevnt um døming viðvíkjandi umróðri.

Sambært skrásetingunum hjá Róðrarsambandi Føroya vann Havfrúgvin FM-heitið 2013 við 40 stigum.

## Málsgongd

Málið varð fyrst kært til Róðrarsamband Føroya, sum ikki gekk klaguni hjá VÍF Kappróðri á møti. Grundgevingin hjá Róðrarsambandinum er fylgjandi:

*"Nevndin hjá RSF metir at høvuðsdómarin hevur dømt rætt, Havfrúgvin loysti startin ( slippkrókin ) úr bátinum, hetta fingu allar manningarnar til allar róðrarnar at vita at tað gav reytt kort. Tískil fekk Havfrúgvin reytt kort.*

*Viðvíkjandi umróðrinum er eingin serskild grein at døma eftir, tí verður tað dømt eins og tað var ein vanligur róður, og kolldømingin á einum kappingardegi er galdandi fyri allar róðrarnar tann dagin róð verður. Tískil fær Havfrúgvin onga plasering og heldur eingi stig."*

VÍF Kappróður kærdi avgerðina hjá Róðrarsambandi Føroya til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandinum, sum staðfesti avgerðina hjá Róðrarsambandi Føroya. Í niðurstøðuni vísti Dómsnevndin á, at hon metti seg ikki hava heimild at broyta meting dómarans í kapping.

Í sambandi við viðgerðina í Ítróttadómstólinum, hevur Ítróttadómstólurin heitt á Róðrarsambandið um at vísa á, hvar reglan um at *"kolldøming á einum kappingardegi er galdandi fyri allar róðrarnar tann dagin róð verður"*, stendur ella kemur frá.

Viðkomandi brot úr svarið frá Róðrarsambandinum er soljóðandi:

*"Henda reglan stendur ongar staðir skrivað, tí tað er bert ein reglugerð fyri ávaringar, og tað er ikki ein serstøk reglugerð fyri umróður. Tá vit tosa um ávaring verður sama reglugerð nýtt til bæði vanligan róður og umróður, og reglugerðin sigur púra greitt "reytt kort fyri tjóvstart á Ólavsøku", t.v.s. eingin stig. Her verður ikki skilt í millum róður og umróður."*

## Ítróttadómstólurin skal viðmerkja

Við atliti til meginregluna um, at kærumyndugleiki ikki eigur at fara inn og eftirmeta eina avgerð, ið ein dómari hevur tikið í leiki, og sum byggir á meting dómarans, tekur dómstólurin ikki støðu til, um Havfrúgvin tjóvstartaði ella ikki, og heldur ikki avgerð dómarans um at geva Havfrúnni reytt kort, grundað á meting dómarans um, at Havfrúgvin hevði tjóvstartað.

Avgerðin hjá startdómaranum hesum viðvíkjandi stendur tí við.

Hinvegin metir Ítróttadómstólurin ikki, at grundarlag er fyri niðurstøðuni hjá Róðrarsambandi Føroya, ið er staðfest av dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, har sagt verður, *"Viðvíkjandi umróðrinum er eingin serskild grein at døma eftir, tí verður tað dømt eins og tað var ein vanligur róður og kolldøming á einum kappingardegi er galdandi fyri allar róðrarnar tann dagin, róð verður. Tískil fær Havfrúgvin onga plasering og heldur eingi stig."*

§

Ítróttadómstólurin

Orsøkin til at umróður fór fram millum Havfrúnna og Ørnina á róðrinum tann 28. juli 2013 var tann, at ikki var gjørligt í fyrra róðrinum at gera av, hvør av hesum bátum var fyrri um málstrikuna.

Úrslitið frá fyrra róðrinum var sostatt, at báðir bátarnir í minsta lagi høvdu vunnið sær eitt 2. pláss í róðrinum.

Umróðurin hevði tí bert til endamáls at gera av, hvør av bátunum Havfrúgvin ella Ørnin skuldu vinna róðurin á Ólavsøku 2013, og eigur umróðurin í hesum føri tí onga ávirkan at hava á støðuna hjá hinum bátunum, ið luttóku í fyrra róðrinum.

Dómstólurin er tí ikki samdur við Róðrarsambandi Føroya í, at reglan um at *"reytt kort verður givið fyri tjóvstart á Ólavsøku"* í hesum ítøkiliga føri eisini merkir, at tann, ið fær reytt kort í umróðri, eisini missir sína plasering í fyrra róðrium, og harvið eisini stigini, ið henda placering gevur.

Ítróttadómstólurin grundar hesa støðutakan á, at reglugrundarlagið hjá Róðrarsambandi Føroya ikki viðgerð hesa støðuna og Ítróttadómstólurin metir ikki, at grundarlag er fyri tulkingini hjá Róðrarsambandi Føroya í verandi reglugerð um ávaringarskipan.

Ítróttadómstólurin fer at mæla Róðrarsambandinum til at fáa skrivað inn í lógarverkið hjá Róðrarsambandinum møguligar reglur, ið dømt verður eftir.

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi avgerð Ítróttadómstólurin, at VÍF Kappróður fær viðhald í kæruni, soleiðis at Havfrúgvin fær 2. plássið í fyrra róðrinum á Ólavsøku 2013 og tey 6 stigini, ið hetta gevur Havfrúnni.

Tórshavn, tann 6. november 2013

Anna Dam | Anja Hovgaard | Poul Hansen

Børge B. Hansen | Jóhan J. Lamhauge